## Skotski venjarin ridlar

Sambært bretskar miðlar, stendur á gomlum nøglum hjá skotska landsliðsvenjaranum, George Burley, eftir at Skotland leygardagin tapti 0-3 í einum venjingardysti ímóti Wales. Burley tók við sum venjari eftir miseydnaðu HM-undankappingina hjá skotum, men longu nú sigst skotska fótbóltssambandið umhugsa at skifta hann út. Sum altíð, verða longu nú nevnt nøvn, ið kunnu hugsast at loysa hann av, og sambært miðlarnar eru Dundee-venjarin, Craig Levein, og Rangers-venjarin, Walter Smith, best hugsandi avloysararnir.



## Franskir skaðar darva

Franska landsliðið slapp ikki snikkaleyst frá at vinna á Írlandi leygarkvøldið, tí Eric Abidal bleiv skaddur og spælir ikki við mikukvøldið, eins og Jeremy Toulalan, ið ikki var við leygarkvøldið, heldur ikki verður klárur til seinna dystin mikudagin. Hóast nógv stendur upp á spæl, hevur franski landsliðsvenjarin, Raymond Domenech, boðað frá, at hann ikki ynskir at taka aðrar spælarar út í teirra stað.

# Alt er opið mikukvøldið

**Eingin er úti og eingin er heilt inni í hitanum enn. Leygarkvøldið spældu átta evropeisk lið um at tryggja sær sætið í HM-endaspælinum, men soleiðis sum úrslitini lagaðu seg, er absolutt einki avgjørt undan seinnu play-off dystunum**



Franski landsliðsspælarin, Andre-Pierre Ginac, vinnur her bóltin frá írska mótstøðumanni sínum, Sean St Ledger, í dystinum millum Frakland og Írland í Dublin leygarkvøldið

Mynd: Peter Morrison/ AP Photo




Rólant Waag Dam

Tríggir sigrar – tó eingin við meira enn einum máli – umframt ein mál-leysur javnleikur. Tað vóru úrslitini av teimum fýra play-off dystunum leygarkvøldið.

Harvið er líkt til, at vit fáa eitt rimmar endabrak upp á undankappingina til HM-endaspælið, sum byrjar fríggjadagin 11. juni í 2010.

### Fraklendingar góð kort

Av teimum átta liðunum, mugu fraklendingar metast at hava best kort í hondini, nú teir á heimavølli skulu verja eina 1-0 leiðslu.

Málinum stóð Anelka fyri, tá hann 18 minuttir fyri leiklok umvegis eitt írskt bein snýtti Given við einum skoti úti frá.

Sæð við føroyskum eygum er henda uppgerð rættiliga áhugaverd. Ikki minst tí, at Føroyar vóru í sama bólki sum Frankaríki, men eisini tí, at landsliðsvenjari okkara, Brian Kerr, er íri og hevur staðið á odda fyri írska landsliðnum.

1-0 er ikki nøkur leiðsla sum so, men føroyingar vita, at fraklendingar á heimavølli kunnu vera óhugnaliga sterkir.

Seinastu dystirnir hava eisini staðfest, at franska liðið er við at finna seg sjálvt spakuliga. Sigurin leygarkvøldið staðfesti hetta, tí Írland hevði annars ikki tapt ein dyst í hesi undankappingini.

### Tríggir tættir dystir

Í hinum trimum evropeisku play-off dystunum ber ikki til at tosa um favorittar í sama mun.

Portugal fekk við eymk og fret hálað ein heimasigur í hús, tá Bosnia/Hersegovina vitjaði. Portugal førdi 1-0, men beint fyri leiklok raktu gestirnir fyrst tvørtræið og so stongina.

Væntandi nærleikin í avgerandi løtunum kann kosta Bosnia/Hersegovina dýrt, tí ikki færri enn tríggir mans eru leikbannaðir til mikukvøldið. Spahic, Rahimic og Muratovic sóu allir gult og eru tískil leikbannaðir.

Tað var annars Alves sum gjørdi málið hjá Portugal, eftir at Nani og Deco høvdu staðið fyri uppspælinum. Nani, sum røkti plássið hjá skadda Ronaldo, var mest eyðsýndi leikarin hjá Portugal.

Málríkasti dysturin leygarkvøldið var í Russlandi, har heimaliðið vann 2-1. Tveir minuttir fyri leiklok sá tað sera gott út hjá Russlandi. Bilyaletdinov hevði syrgt fyri eini góðari 2-0 leiðslu, men innskifti Pecnik skaffaði Slovenia eitt ógvuliga umráðandi útivallarmál í 88. minutti.

Í Grikkalandi megnaði hvørki heimaliðið ella gestirnir úr Ukraina at skora. Hetta hóast grikska liðið hevði toppskjútttan í hesum undanumfarinum á liðnum. Gekas hevur nevniliga sum tann einasti skotið tíggju mál.

Men hvørki hann ella hinir leikararnir á vøllinum megnaðu at skora. Fótbóltsliga var dysturin heldur eingin uppliving, men spenningurin er kortini ikki minkaður undan seinna play-off dystinum.

### Spenningur í Afrika

Eisini í Afrika er spenningurin øgiligur undan mikukvøldinum. Tá spæla Egyptaland og Algeria uttanveltaðum vølli, um hvør teirra skal víðari í HM-endaspælið.

Tey bæði liðini endaðu nevniliga púra jøvn í bólkaspælinum, eftir at Egyptaland vann 2-0 á Algeria leygardagin. Tískil er neyðugt við umdysti, sum verður spældur í Sudan.

Í Afrika eru tó fleiri lið, sum hava spælt seg víðari. Ghana, sum spældi 2-2 í móti Mali leygardagin, hevði undan dystinum tryggjað sær luttøku, men bæði Cameroon og Nigeria spældu seg víðari tá.

Hjá Cameroon er hetta sætta ferðin, at liðið skal royna seg í eini endakapping, og tað er afrikanskt met. Metið settu teir við 2-0 sigrinum á Marokko.

Hjá Nigeria er ikki talan um nakað met, men teir spældu seg víðari við at vinna 3-2 á Kenya.

Eitt annað fjarskotið land, sum eisini tryggjaði sær luttøku til HM-endaspælið um vikuskiftið, var New Zealand. Teir vunnu 1-0 í play-off dysti á Bahrain og eru harvið við í endaspælinum fyri aðru ferð.

Í Suðuramerika eru tey hinvegin ikki heilt liðug við undankappingina. Har vann Uruguay 1-0 á Costa Rica leygarkvøldið, og eins og í evropeisku undankappingini, verður seinni dysturin spældur mikukvøldið.

**FAKTA**

**Seinnu play-off dystirnir mikukvøldið:**

Frankaríki-Írland (1-0)
Bosnia/Hersegovina-Portugal (0-1)
Ukraina-Grikkaland (0-0)
Slovenia-Russland (1-2)